FOLKETINGETS
OMBUDSMAND

# Upplýsingar um teg hjá umboðsmanninum

Hesin faldarin er serliga til tín,

- sum er barn ella ungfólk,
- og sum hevur havt vitjan av umboðsmanninum, har tú býrt ella hevur tilhald
- ella hevur skrivað til umboðsmannin
- ella er nevnd/ur av øðrum í einum brævi til umboðsmannin.

Vit hava móttikið upplýsingar um teg, og teir eru goymdir í KT-skipanini hjá umboðsmanninum.

**Her kanst tú lesa um,**

- hvat vit gera við upplýsingarnar, vit goyma
- hvat tú hevur rætt til, tá vit hava goymt upplýsingar um teg.




## Um tú vilt spyrja um nakað ...

... ella síggja, hvørjar upplýsingar vit hava goymt um teg, kanst tú ringja til okkara á:

**+45 33 13 25 12**

Tú kanst spyrja eftir málsviðgeran, sum hevur skrivað til tín, ella okkara dátuverndarráðgeva. Tú kanst eisini skriva til dátuverndarráðgevan á:

**dpo@ombudsmanden.dk ella post@ombudsmanden.dk.**

Um tú hevur ein talgildan postkassa á Borger.dk, kanst tú skriva trygt til okkum haðani.

Tú kanst klaga til Datatilsynet um okkara viðgerð av upplýsingum um teg:

**Datatilsynet**
Carl Jacobsens Vej 35
DK-2500 Valby

dt@datatilsynet.dk
tlf. +45 33 19 32 00

## Hvørjar

upplýsingar hava tit goymt um meg?

Vit goyma øll brøvini, vit senda. Tí goyma vit t.d. navn og bústað hjá teimum, vit skriva til.

Øll brøv og skjøl, vit fáa, verða skannað og goymd í okkara KT-skipan. Tað er eisini galdandi fyri brøv frá kommunum ella øðrum myndugleikum.



## Hvat

hava tit um meg í tykkara KT-skipan?

Tú hevur rætt til at fáa at vita, hvørjar upplýsingar vit hava goymt um teg – eisini tá vit hava fingið tær frá øðrum, t.d. kommununi.

Tú hevur eisini rætt til at síggja tær.

Um vit hava biðið onnur um upplýsingar um teg fyri at kunna viðgera eina klagu frá tær ella um teg, so hevur tú rætt til at fáa at vita, hvaðani upplýsingarnar eru komnar – t.d. frá kommununi ella øðrum myndugleikum.

## Nær

strika tit upplýsingar, tit hava goymt um meg?

Vit goyma upplýsingar so leingi, sum tað er neyðugt fyri okkara arbeiði. Tað er okkara skylda.



## Hvussu er,

um eg ikki vil hava, at mínar upplýsingar verða goymdar?



Um tú biður okkum strika ella rætta okkurt um teg, tí tú heldur, at tað er skeivt, so kanna vit, um tað ber til – vit kunnu ikki bara siga nei.

# Meira um GDPR og umboðsmannin

Umboðsmaðurin savnar inn og viðger persónsupplýsingar

- um borgarar, sum klaga til umboðsmannin
- um onnur enn klagarar, um tey eru umrødd í einari klagu til umboðsmannin ella í tilfarinum, sum umboðsmaðurin savnar inn sum liður av viðgerðini av eini klagu
- um borgarar, tá hann kannar eitt mál av sínum eintingum, t.e., at hann sjálvur tekur fyrsta stig at kanna eitt mál
- um m.a. brúkarar og starvsfólk, tá hann er á eftirlitsvitjan á støðum undir sínum málsræði.

Upplýsingarnar verða skrásettar í KT-skipanini hjá umboðsmanninum og eru partur av málsviðgerðini.

## Hvørjar upplýsingar verða savnaðar inn

Umboðsmaðurin savnar inn persónsupplýsingarnar, sum eru viðkomandi fyri málið, hann viðger. Í nógvum førum er neyðugt at savna inn tilfar frá klagarum og myndugleikum afturat tí, sum var við í klaguni.

Fyri allar klagarar (og aðrar umrøddar persónar) verður skrásett

- navn og bústað (eyðmerkingarupplýsingar).

Upplýsingarnar, sum eru viðkomandi til eitt serligt mál, verða eisini skrásettar. Tað kann eitt nú vera upplýsingar um

- sosialar umstøður
- fíggjarligar umstøður
- familjuviðurskifti
- starvsviðurskifti.

Summi mál innihalda harumframt viðkvæmar upplýsingar, t.d. um

- heilsu
- fólkaslag og tjóðbólkaeyðkenni (etnicitet)
- fakfelagsviðurskifti.

Umboðsmaðurin viðger eisini mál við upplýsingum um **brotsgerðir.**

Umboðsmaðurin skrásetur **CPR-nummur** fyri at kunna eyðmerkja borgarar og seta seg í samband við teir umvegis talgilda postkassan.

Umboðsmaðurin skrásetur bæði upplýsingarnar, sum borgarar sjálvir senda inn og upplýsingar frá myndugleikum.

Uppgávurnar og virksemið hjá umboðsmanninum er ásett í umboðsmannalógini.

Viðvíkjandi skráseting, innsavning og viðgerð av persónsupplýsingum, fevnir umboðsmannalógin eisini um dátuverndarreglugerðina og dátuverndarlógina.

FOLKETINGETS OMBUDSMAND

Grundarlagið hjá umboðsmanninum fyri skráseting og viðgerð av upplýsingum er umboðsmannalógin (lóg um fólkatingsins umboðsmann, ber saman lógarkunngerð nr. 349 frá 22. mars 2013), dátuverndarreglugerðin (2016/679/EU) grein 5, 1. stykki, grein 6, 1. stykki, litra c og e, grein 9, stykki 1, ber saman 2. stykki, litra f, grein 10 umframt dátuverndarlógin (lóg nr. 502 frá 23. mai 2018) § 5, 1. og 2. stykki, § 6, 1. stykki, § 7, 1. stykki, § 8, 1. stykki, § 9, 1. stykki, § 11, 1 stykki.

## At geva upplýsingar víðari

Í nógvum førum noyðist umboðsmaðurin at geva upplýsingar víðari, t.d.

- tí at ein ella fleiri myndugleikar skulu gera viðmerkingar til málið – í hesum føri verður m.a. eitt avrit av eini klagu sent til myndugleikan saman við tilfarinum, sum umboðsmaðurin møguliga hevur fingið við klaguni
- tí at klagan skal sendast víðari til myndugleikan, ella at myndugleikin skal kunnast um málið
- tí at umboðsmaðurin viðger eina umbøn um innlit.

Um ein persónur býr í Grønlandi ella Føroyum hevur umboðsmaðurin møguliga tørv á at senda upplýsingar víðari til ríkismyndugleikarnar har.

Øll málsviðgerð hjá umboðsmanninum verður handfarin av málsviðgerum – umboðsmaðurin nýtir ikki sjálvvirkandi avgerðir.

## Varðveitsla og kunngering

Upplýsingar verða varðveittar so leingi, sum neyðugt er fyri at loysa uppgávurnar hjá umboðsmanninum. Eitt endamál við at varðveita upplýsingar (mál) er at hava atgongd til møgulig eldri mál hjá klagaranum, eitt annað er at kunna leita í líknandi málum.

Summi brøv og ummæli hjá umboðsmanninum verða almannakunngjørd á ombudsmanden.dk ella offentlighedsportalen.dk og í Retsinformation – eitt nú tí, at málið hevur serligan týdning.

Áðrenn tekstir verða kunngjørdir, verða teir rættaðir, so persónurin ikki kann kennast aftur.

Les meira um málsviðgerðina o.a. hjá umboðsmanninum á heimasíðu umboðsmansins: ombudsmanden.dk/findviden/publikationer

Finn meira kunning um dátuverndarreglugerðina og dátuverndarlógina á heimasíðuni hjá Datatilsynet, **www.datatilsynet.dk**

**Fólkatingsins umboðsmaður**
Gammeltorv 22
DK-1457 København K
Tlf. +45 33 13 25 12
www.ombudsmanden.dk
post@ombudsmanden.dk